Dagf. 25. mai 2021
UMMR J. nr.: 21/09341-1

Kaj Leo Holm Johannesen,
Landsstýrismaður

Svar
upp á

Fyrispurning nr. 52-147/2020 eftir § 52a í tingskipanini um ætlanina hjá landsstýrinum um grøna endurreisn, frá Ingilín Didriksen Strøm, løgtingskvinnu

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvat meinar landsstýrismaðurin við, tá hann sigur, at vit í Føroyum skulu hava "grøna endurreisn"?
2. Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur landsstýrið um sokallaða "grøna endurreisn"?

Til spurning 1 og 2
Omanfyri nevndu spurningar taka støði í einari grein, har eg sum norðurlendskur samstarvsráðharri, saman við mínum starvsbrøðrum í Danmark og Grønlandi, taka saman um okkara felags formansskap í Norðurlanda Ráðharraráðnum í 2020. Vit staðfesta m.a. í hesari grein, har vit standa á gáttini til 2021, at nýggja virkisætlanin, sum fevnir um tíðarskeiðið 2021 til 2024, sum er partur av visjón 2030, hevur nógv spennandi átøk við sær, m.a. eisini á grøna økinum.
Tá eg, sum norðurlendskur samstarvsráðharri, nevni grønu endurreisnina, so verður sipað til innihaldið á hesum øki í okkara felags norðurlendsku virkisætlan, sum røkkur frá ársbyrjan í ár og fram til endan av 2024. Málini í hesari virkisætlan fara í gongd í hesum ári, og miðað verður eftir, at málini verða rokkin í 2024. Okkara embætisfólk, saman við hinum embætisfólkunum í hinum norðurlondum og norðurlendskum stovnum o.ø., fara nú at seta hesi mál í verk, sum eru galdandi fyri øll norðurlond. Her standa nógv spennandi mál á skránni, sum vit í Føroyum óivað eisini fara at fáa nógv gagn av.
Eg kann annars nevna, at Føroyar hava fingið munandi upphæddir frá Norðurlanda Ráðharraráðnum til at fremja spennandi verkætlanir komandi tíðina á grøna økinum, nevniliga bygging av einum fult elriknum alibáti, sum eftir ætlan verður latin Bakkafrost um ársskiftið, og menna og byggja eina jarð- og fjarhitaskipan í Leirvík, ið einans nýtir grøna elorku. Seinna verkætlanin verður ætlandi klár at taka í nýtslu á sumri næsta ár. Her er veruliga talan um slóðbrótandi ætlanir.

Kaj Leo Holm Johannesen

landsstýrismaður